# Rokaligt á Kaldbaksvegnum

**Tað var rættuligur ruðulleiki á Kaldbaksvegnum í morgun, tá ið fleiri bilar rendu seg fastar í kavanum ella fóru út av vegnum**

FERÐSLA

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Klokkan umleið níggju í morgun var Tórshavnar Sløkkilið liðugt við at toga bilar leysar, sum høvdu rent seg fastar í kavafonnum ella vóru farnir út av vegnum í Kaldbaksbotni.



*Tað var rættuliga rokaligt á Kaldbaksvegnum í morgun, tá ið fleiri bilar rendu seg fastar í stórar kavafannir, og aðrir fóru út av vegnum.*

*savnsmynd*

### Rýkur illa

Vakthavandi á politistøðini í Havn segði í morgun, at sløkkiliðið hevði brúkt umleið ein hálvan tíma at toga seks bilar leysar, sum annaðhvørt stóðu fastir í kavafonnum ella vóru farnir av vegnum.

Umframt teir seks bilarnar, sum sløkkiliðið noyddist at veita eina hjálpandi hond, vóru fleiri aðrir, sum stóðu fastir, men hesir megnaðu tó sjálvir at koma leysir aftur.

Felags fyri allar bilarnar, ið vóru komnir í trupulleikar, var, at teir vóru á veg norðureftir, og at teir komu í trupulleikar í brekkuni niðan móti tunnilsmunnanum í Kaldbaksbotni.

Nógvu trupulleikarnir av ferðsluni høvdu eisini við sær, at landsvegurin var stongdur í nærum ein hálvan tíma, og tað hevur óivað eisini merkt, at fleiri bygdafólk gjørdust ov sein til arbeiðis í Havnini í morgun.

Løgreglan var á staðnum frá umleið klokkan átta í morgun, og vakthavandi segði, at umframt stórar kavafannir, var tað ein stórur trupulleiki, at tað reyk so illa. Til tíðir reyk so illa, at bilar noyddust at standa stillir, tí sýnið var so vánaligt.

# Bert smávegis óhapp kring landið

**Hóast hálkan og kavin elvdi til ferðsluruðulleika á Kaldbaksvegnum í morgun, hava smærru politistøðirnar kring landið havt sera lítið at gjørt í sambandi við hálkuna**

FERÐSLA

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Á politistøðunum í Runavík, Klaksvík og á Tvøroyri verður tó sagt frá, at tað liggur nokk so fitt av kava, men at tað ikki tykist sum um, at hetta hevur ávirkað ferðsluna stórvegis.

### Politibilur rendi á

Á politistøðini í Runavík sigur vakthavandi, at har hevur hálkan ikki elvt til nakað ferðsluóhapp. Í gjárkvøldið bleiv ein hundur árendur á Strondum, og í morgun var eitt lítið ferðsluóhapp í túninum hjá løgregluni, tá ið ein av politibilunum rendi á ein parkeraðan bil hjá einum av starvsfólkunum á politistøðini. Skaðin var tó lítil og eingin, og hálkan var ikki orsøk til óhappið, sigur vakthavandi.

Í Klaksvík hevur eingin fráboðan um nakað ferðsluóhapp verið í dag, men í gjárkvøldið vóru tvey smærri óhapp, hóast nokk so fitt av kava liggur.

Eisini í Suðuroynni hevur verið ógvuliga friðarligt. Á politistøðini á Tvøroyri upplýsir vakthavandi, at telefonin hevur verið púra kúrr, og teir hava onga fráboðan fingið um nakað óhapp.

# 2005 var metár fyri upsa

**Síðani avreiðingarskipanin varð sett í verk, hevur tað ongantíð verið fiskað og avreitt so nógvur upsi sum í fjør**

FISKIVINNA

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í 2005 vóru fiskaði sløk 62000 tons av upsa, og tað er ein vøkstur upp á heili 45 prosent í mun til árið fyri, skrivar Hagstovan á heimasíðu sínari.

### Prísurin eisini góður

Besta upsaárið undan 2005 við verandi avreiðingarskipan var í 2001, tá ið eini 51.000 tons av upsa vóru avreidd um avreiðingarskipanina í Føroyum.

Umframt at upsafiskiskapurin var serstakliga góður í fjør, so var avreiðingarprísurin eisini verið væl betur í fjør enn undanfarnu árini, tá ið hann var stak vánaligur.

Tíverri hevur toskafiskiskapurin als ikki verið eins góður sum upsafiskiskapurin, tí í 2005 vóru einans 19.000 tons avreidd, og tað er væl undir miðal. Hinvegin er avreiðingarprísurin fyri tosk sera góður, og prísurin nærkast prísunum í 2001, sum var metár fyri toskaprís.

Á heimasíðuni hjá Hagstovuni stendur somuleiðis at lesa, at avreiðingarnar uttanlands vóru munandi minni í fjør enn árini frammanundan. Nógv tann størsti parturin av feska fiskinum, sum fer av landinum óvirkaður, verður útfluttur, eftir at hann er avreiddur í Føroyum.



*Árið í fjør var metár fyri upsafiskiskap. Ikki færri enn 62.000 tons av upsa vóru avreidd umvegis avreiðingarskipanina, og er tað ein vøkstur upp á umleið 45 prosent í mun til í 2004.*

*savnsmynd*

# Bersøgin Ísraelsvinur kemur á vitjan

**Rithøvundurin Ramon Bennett úr Jerúsalem vitjar oyggjar okkara saman við konu síni Zipporah í tíðarskeiðinum frá 3. til 10. mars, Hann fer at hava fundir og fyrilestrar kring landið**

VITJAN

Ramon Bennett er útbúgvin teologur, er altjóða viðurkendur bíbliulærari við serfrøði innan bíbliunnar profeti. Hann er søgu- og politiskur greinskrivari, og hevur serstakt altjóða innlit, tá ið tað snýr seg um heimshendingar.

– Boðskapur hansara er upplýsandi og bergtekur áhoyraran, verður sagt um hann.

### Kjak eftir bók

Ramon rekur saman við konu síni Zipporah felagskapin ”Arm of Salvation” sum hevur miðstøð sína í Jerúsalem. Ramon er dagligur leiðari, meðan Zipporah virkar sum atstøðuleiðari.

Ramon Bennett hevur skrivað fleiri bøkur, har vit fáa innlit í servitan hansara, tá ið tað snýr seg um bíbilsk profeti og Miðeystur.

Metsølubókin ”Filisterne, myten om det palestinske folk“ (norska heitið) er ein óvanlig bersøgin avdúking av ”friðartilgongdini“ í Miðeystri. Bókin skapar kjak millum jøðar, muslimar ella kristnir zionistar, vegna bersøgnu og óttaleysu skrivingina.

Síðani hann byrjaði altjóða arbeiði sítt í 1987, hevur Ramon hildið fyrilestrar, havt frálæru, talað á møtum, á ráðstevnum og á bíbliuskúlum kring heimin. Eisini er hann tíðum gestur í sjónvarpssendingum og øðrum fjølmiðlum.

Hetta er aðru ferð Bennetthjúnini vitja oyggjar okkara, seinast var á sumri 1997.

Bennett-hjúnini koma til Føroya fríggjadagin 3. mars. Tey hava tíðindafund í Norðurlandahúsinum mánadagin 6. mars kl. 10.

Fyrsti fyrilesturin verður hildin í kommunuskúlanum í Havn leygarkvøldið, har Sangkórið í Siloa fer at syngja. Sunnudagin kl. 15 hava tey fund í skúlahøllini í Trongisvági, har sangkórið undir leiðslu av John í Skemmuni fer at syngja. Sunnukvøldið kl. 20 verða tey í missiónhúsinum „Libanon“ í Sørvági.

Í komandi viku verða tey í „Filadelfia“ í Gøtu, í bygdarhúsinum „Samljóð“ í Skopun og í „Betesda“ í Klaksvík.

sb.